# Hanne-Vibeke Holst til Føroya




*Nú fáa føroyingar eisini høvi at uppliva kenda, danska rithøvundan Hanne-Vibeke Holst, sum herfyri vann prísin "De Gyldne Laurbær"*

**Í mei mánað kemur væl umtókti danski rithøvundurin Hanne-Vibeke Holst til Føroyar at halda fyrilestur um javnstøðuhugtakið í sínum bókum**

VITJAN
*Anna V Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Kvinnur, politikkur og vald verða á breddanum, tá kendi danski rithøvundurin Hanne-Vibeke Holst kemur til Føroyar at halda fyrilestur í mei mánað.

Tað eru Javnstøðunevndin og Demokratia, sum hava boðið Hanne-Vibeke Holst hendavegin at halda fyrilestur við støði í hennara bókum *Kronprinsessen*, *Kongemordet* og *Dronningeofret*, har gjøgnumgangandi temaið er kvinnur, politikkur og javnstøða.

– Hesar bøkurnar viðgera í fleiri mátar somu spurningar, sum Javnstøðunevndin og Demokratia arbeiða við. Tí hildu vit tað vera rættiliga hóskandi at bjóða júst Hanne-Vibeke Holst til Føroyar at tosa um hesi evni, sigur Kristianna Winther Poulsen, forkvinna í Javnstøðunevndini.

### Røkkur langt

Hanne-Vibeke Holst hevur vunnið hópin av prísum fyri sínar bøkur, og er hon ein av best umtóktu rithøvundunum í Danmark í løtuni. Forkvinnan í Javnstøðunevndini dylur heldur ikki yvir, at hetta eisini hevur havt týdning fyri, at tað júst bleiv Holst, sum fekk innbjóðingina at koma til Føroya.

– At hon hevur ein so stóran lesaraskara ger jú, at hennara boðskapur røkkur út til sera ymisk fólk - eisini tey, sum kanska ikki hugsa so nógv um javnstøðuspurningin annars, sigur Kristianna Winther Poulsen.

Hanne-Vibeke Holst luttekur javnan í almenna kjakinum í Danmark og aftrar seg ikki við at kalla seg sjálva eina "javnstøðukelling". Eisini á Altjóða Kvinnudegnum fyrradagin var hon at hoyra, tá dagblaðið Politiken skipaði fyri kjakfundi. Á fundinum segði Holst millum annað, at hon helt tað vera tankavekjandi at hoyra, at flestu kvinnuligu politikarar kenna seg sjálvar aftur í bókunum *Kronprinsessen*, *Kongemordet* og *Dronningemordet*.

Tað, eg havi roynt at lýsa í hesum tríverkinum, er, hvussu valdið svarar kvinnum aftur: Hava kvinnur tað serliga trupult í politikki ella hava tær lættari við at vekja uppmerksemi. Megna tær at dribla seg undan mannfólkaræðinum, sum tær fara inn í og fáa at ridla?, spurdi Holst, sambært Politiken.

### Miðlarnir taka kvinnukroppin

Hon legði afturat, at tað, sum miðlarnir gera við kvinnuligar politikarar, í fyrstu atløgu ofta er ein fyrimunur fyri tær. Til javnvágin koppar.

– Miðlarnir halda, at teir kunnu fáa alla kvinnuna. Teir fáa hennara høvd, men teir fáa eisini hennara kropp. Teir gera innrás í hana. Alt tað veit ein ungur, nýggjur kvinnuligur politikari kanska ikki. Hon er álitisfull og vísir alt klæðnaskápið og familjuna fram. Afturfyri er tað eisini tað, hon seinni verður feld uppá, staðfesti Hanne-Vibeke Holst.

Sambært Holst er tað framvegis soleiðis, at menn, sum hava vald, hugtaka, meðan kvinnur, sum hava vald, provokera. Tí gjalda kvinnur við valdi eisini ein stóran prís. Harvið er ikki sagt, at kvinnur ikki skulu átaka sær vald. Tær hava skyldu til at gera tað, sigur Holst, hóast hon ásannar, at júst hørðu treytirnar ræða kvinnur frá at taka valdið.

– Tað liggur nakað av harðleika í valdinum, og eg vildi fegin kunna sagt, at kvinnur kunnu umdefinera valdið og gera tað minni harðrent. Tað eri eg ikki vís í, at vit kunnu, men eg eri framvegis í ferð við at kanna tað, segði danski rithøvundurin.

Vitjanin hjá Hanne-Vibeke Holst er eitt av mongum tiltøkum, sum verða á skránni, í sambandi við at Javnstøðunevndin fyllir 15 ár í ár.

# Tekna ein granskara

**Nýggja kappingin hjá Granskingarráðnum um at tekna ein granskara er byrjað, so nú er at finna litblýantarnar og hugflogið fram**

KAPPING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin*

Øll børn í 1. til 8. flokki kunnu nú luttaka í kappingini hjá Granskingarráðnum, har tey kunnu senda inn tekningar av einum granskara, sum er til arbeiðis.

Børnini gera sjálvi av, um granskarin er ein kona ella ein maður, um hann arbeiðir úti ella inni, er nørdasligur ella stuttligur, stórur ella lítil - bara tað er ein granskari, soleiðis sum tú heldur, at hann sær út.

Gott hevði verið, um børnini tíma at skriva eina ella tvær reglur um, hvat granskarin ger ella hvar hann er á myndini, men hetta er tó ikki eitt krav, siga tey á Granskingarráðnum

### Nógvir vinningar

Kappingin er longu byrjað, so nú er at finna pappír og litblýantar fram, tí hvønn mánað fram til oktober verður ein vinnari funnin. Fyrsta freistin at lata inn tekningar er 30. mars. Øll, sum vitja heimasíðuna www.gransking.fo kunnu atkvøða fyri innkomnu tekningunum, sum verða lagdar á heimasíðuna, tá mánaðarfreistin er úti. Latnar verða virðislønir til nr. 1, 2 og 3. Vinningarnir eru bøkur frá Føroya Skúlabókagrunni.

Í november velur ein dómsnevnd so tríggjar tær bestu tekningarnar millum allar innkomnu tekningarnar, uttan mun til, hvør hevur vunnið mánaðarkappingarnar. Í dómsnevndini sita umboð fyri Granskingarráðið og listafólk.

Høvuðsvinningarnir eru: Nr. 1 – Dell telda frá City, virði uml. kr 5.000, nr. 2 og 3 – fartelefon frá Vodafone, virði hvør uml. kr. 2.500

### Kveikja áhuga

Á Granskingarráðnum siga tey, at endamálið við at fyriskipa kappingina er at kveikja áhugan millum børn og ung fyri gransking og útbúgving innan vísindi.

Við at leggja allar tekningarnar á heimasíðuna vónar Granskingarráðið, at allir luttakarar, vinfólk teirra, foreldur, lærarar og onnur fáa høvi at síggja tekningarnar og fáa íblástur og hugskot til nýggjar tekningar ella prát um vísindi.

Fá meir at vita um kappingarreglur og annað á www.gransking.fo




*30. mars er fyrsta freisin at lata inn tekningar til nýggju kappingina hjá Granskingarráðnum*



*Tvær av vinnaratekningunum í norsku "Tekna ein granskara" kappingini í 2005*



MÓTTØKA

Nýggjur verkstaðsbygningur tikin í nýtslu

Í sambandi við, at okkara nýggi verkstaðsbygningur á Hjalla verður tikin í nýtslu, verður opið hús á verkstaðnum hósdagin 12. mars 2009, kl. 15.00 – 17.00

Vinarliga
Maskinverkstaðurin á Hjalla P/F

MVH umboðar: KOMATSU VOLVO

MVH MASKINVERKSTAÐURIN Á HJALLA

sansir.fo